# BØNARLØTAN

**JUNI, JULI, AUGUST** **2023** **38. árg.**

***1. dagur*** ***Sálm. 81 og 82, 1. Sám. 11.1-15, Gal. 2.1-21***



*Naalersitaq-toymið saman við Sofusi Gregersen, ferðaleiðara.*

## GRØNLAND, Nuuk, Naalakkap Jiisusip Oqaluffa
## Hans Sivertsen

Vit takka fyri, at nóg nógv hava teknað seg at hjálpa til á barnaleguni 29. juni - 6. juli og á ungdómsleguni 7-13. juli í Naalersitaq og í Nuuk, har Outreach verður 15-20. juli. Enn er ongin at hjálpa til á familjuleguni 23-30. juli í Naalersitaq. Kunning Ragnhild tel. +299 486448 ella rj@malikseafood.gl

## KRINGVARPIÐ

4. juni útvarpsmøti, Ebenezer
18. og 25. juni sjónvarpsandakt, Jógvan Jacobsen
2. aug útvarpsmøti, Bethel, Vágur
3. sept. sjónvarpsmøti, Vitnið, Hvalba

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00: Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00: Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Anna og Hans Djurhuus**
1. juni taka hjúnini Ansa og Arnold Mortensen við sum fyristøðufólk á Malta. Vit bæði, Anna og Hans, takka Harranum fyri trúfesti hesi 12 árini. Vit verða framvegis partur av samkomuni á Malta. Biðið fyri teimum og okkum við, at Harrin vísir okkum, hvønn veg vit skulu fara í tænastuni.

*1. august fyllir Andreas Nónstein 14 ár

***2. dagur*** ***2. Tim. 4.1-22, Áp. 14.1-28, 1. Mós. 31.17-35***

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
Í Kristnastovu er summarið merkt av nógvum gestum, ið gista. Vit gleðast um høvi at vísa øllum blíðskap, áðrenn tey fara til tænastur í øðrum londum. Fram til ólavsøku eru uml. 80-90 gistingar. Biðið, at vit fáa náði til hendan partin av arbeiðnum.

**Susan og Øssur Berghamar**
Í sept. eru 50 ár, síðani vit byrjaðu at savna føroyingar í heimi okkara á Oxford Allé á Amager. Harrin signaði verkið ríkliga, sum hevur hildið á til henda dag. Vit takka øllum hjartaliga, sum hava staðið saman við okkum um verkið og framvegis minnast allar tær ymisku tænasturnar í og út frá Kristnastovu!
berghamar@kristnastova.dk



## *3. dagur* *Orðt. 11.1-15, 1. Sám. 12.1-25, Sálm. 92*

### ZAREPTA

Tær átta familjulegurnar halda á til 23. juni. Tær átta summarlegurnar eru frá 25. juni til 13. aug. 18 ár og eldri 18-20. aug., familjur við børnum við breki 24-27. aug., bíbliuskeið 28. aug. til 3. sept. Tørvur er á hjálparfólkum.

### FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa
### Cathy og Jógvan J. Rasmussen

Fyrst í juni fari eg til Filipsoyggjar at arbeiða við tveimum umsetarum, øðrum á Palawan og hinum á Mindanao. Cathy kemur yvir í juli.

## *4. dagur* *Tit. 1.1-16, Áp. 15.1-21, Gal. 3.1-29*

### FØROYAR, Gullbrúdleyp!
### Else og Poul Johan Djurhuus



Vit hátíðarhalda gullbrúdleyp leygardagin 1. juli. Opið hús verður í Berøa, Saltangará, kl. 11-17. Øll eru vælkomin. Eingin tilmelding. Bønarløtan ynskir Else og Poul Jóhan hjartaliga til lukku og biður Harran signa tænastu teirra.

### ONGLAND, Taunton
### Dorit og Simon Marshall

Vit vóru glað at vitja ymiskar samkomur í Føroyum í vár. Simon verður í Amsterdam á fundi í juni. Síðani fara vit bæði til Avstralia og Nýsælands í fimm vikur at hitta fólk í sambandi við ECM-arbeiði. Simon skal eisini tala á møtum, bíbliuskúla og stevnu.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 13, Ester 12, Samuel 8**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 14, Kristina 12**
**– Synnøve og Danjal av Rana, Benjamin 14, Anna Emilie 8, Lukas 3**

## *5. dagur — Orðt. 11.16-31, 1. Sám. 13.1-23, 1. Mós. 31.36-55*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

28. mai - 19. juni eru vit á Filipsoyggjum, har eg tali og havi fundir við leiðsluna. 27. juli-7. aug. eru vit í North Cotes í Onglandi, har eg tali á árligu evropeisku stevnuni fyri trúboðum í farloyvi. Síðan vitja vit familju hjá Judy í Týsklandi eina viku og systkini hjá mær í Danmark nakrar dagar. So til Føroya.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**



Tíðirnar broytast, men evangeliið er tað sama. Avbjóðingarnar eru stórar og helst øðrvísi í Íslandi. Tørvur er á starvsfólki, sum elska Jesus.

* 5. august fyllir Karis Flanagan 10 ár

## *6. dagur — Tit. 2.1-15, Sálm. 89. 1-24, Gal. 4.1-11*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Biðið, at vit megna at banda Markusevangeliið til mixtec-mál hóast nógvar forðingar; eisini at evangeliið verður prentað og býtt

út bæði skrivliga og bandað, og at Matteusevangeliið til fólkið í Santo Domingu verður avgreitt til umsetingarráðgevan. Hann kannar, um vit hava umsett týdningarmikil orðafelli rætt, so sum Himmiríki.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 17, Emma Grace 15, Jónatan 13, Markus 11, Evita 8, Joy 6**



Vit eru nú aftur í Meksiko eftir 10 mánaðir heima í Danmark og Føroyum. Vit eru sera takksom, tí tað gav okkum nýtt mót. Barnalegurnar og ungdómslegan vera í juli og aug. Biðið, at nógv koma til trúgv til frelsu.

## *7. dagur* — *Tit. 3.1-15, Áp. 15.22-41, 1. Mós. 32.1-12*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Vit eru komin aftur úr PNG og hava stevnu á skúlanum 16-18. juni. Biðið fyri næmingunum, ið verða lidnir við lesturin í juli.

## *8. dagur* — *Sálm. 83, 1. Sám. 14.1-23, Gal 4.12-31*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Vit eru Harranum takksom fyri náði og góðsku hansara. Vit vænta okkum eina dóttur í sept. Heilsuverkið er øðrvísi her, og støðan hjá Tanju sum útlendingur hevur eisini avbjóðingar við sær. Biðið, at alt gongur væl alla viðgongutíðina.

## *9. dagur 3. Mós. 7.20-38, Áp. 16.1-21, 1. Mós. 32.13-32*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar – Noah 17, Lydia 6**
Vit gleðast um frálíku samkomuleguna við 120 luttakarum og um, at eini 8-10 nú umhugsa dóp. Miriam verður nú studentur, Noah fer á kristnan studentaskúla, og Lydia byrjar á Thomasskúlanum.

9. juli fyllir Elliot Poulsen 7 ár

## *10. dagur Áp. 10.24-48, 1. Sám. 14.24-52, Sálm 93 og 94*



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 12, Tabita 9, Debora 7, Natan 4**
Símeon Petersen verður liðugur á bíbliuskúla í North Cotes í juli. Fleiri umsóknir frá føroyingum til komandi skúlaár eru longu komnar. Minnist eisini trúboðarar, sum ferðast til og av tænastustøðum í summar.

## *11. dagur 3. Mós. 8.1-17, Áp. 16.22-40, Gal. 5.1-26*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Okkara kall er at arbeiða við bíbliutýðing til deyv, so tey fata sanna boðskapin um Kristus. Deaf Bible Society vitjar Danmark síðst í juni. Í aug. fara vit til Póllands á stevnu at vitja deyvasamkomu í Poznan. Bíbliuarbeiðnum tørvar fíggjarliga hjálp.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Biðið, at vit fáa vísdóm til eisini at boða evangeliið í summar, nú føroysku fundirnir eru farnir í summarsteðg.

## *12. dagur* *Áp. 11.1-30, 1. Sám. 15.1-19, 1. Mós. 33.1-20*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 17, Rebekah 15, Lydia 13**

20-24. juni fara vit til Spania at fyrireika ráðstevnu komandi ár um at hjálpa starvsfólkum í trúboðarafelagsskapum at fáa stuðul til vega. Claire luttekur sum leiðari á TeenStreet í Bretlandi 27. juli - 2. aug. Okkara tannáringar fara eisini á leguna. Claire skal leiða og læra á leguni.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. dagur* *3. Mós. 8.18-36, Sálm. 89.25-53, Gal. 6.1-18*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Tað er framvegis bønarevni, at Harrin sendir okkum skipara og matrós at sigla børnini til og av legunum, og at boðskapurin um fulla og fría frelsu skal koma greitt fram og verða móttikin í trúgv.

**GRØNLAND**
**Juvel II, Gull-Britt og Karsten Hansen**

Ferðin við Juvel II kring Grønland varir til umleið 15. sept. Biðið, at Harrin leiðir, at menniskju koma til trúgv, og at trúgvandi verða lívgað. Biðið eisini um nóg nógva manning til allan túrin, serliga at yngri fólk koma við. Í Grønlandi hava nógv børn og ung tørv á at hoyra boðskapin. Tað hevur stóran týdning, at tey møta trúgvandi javnaldrum.

## *14. dagur* *Áp. 12.1-11, Lukas 7.24-50, 2. Kor. 1.1-11*

**DANMARK**

**Glostrup Frikirke**

Vit gleðast um ferðandi, sum vit vóna vitja Glostrup Frikirke í summar. Sunnudag er breyðbróting kl. 11 og gudstænasta er kl. 12.

**GRØNLAND, Qasigiannguit, Solveig og Daniel Kinda**

## *15. dagur* *Sálm 84 og 85, Ez. 1.1-21, 2. Kor. 1.12-24*

**FØROYAR**

**Shamila og Høgni Johannesen**

Vónandi verða 5-6 ymisk STEVN-programm liðug í juli, eitt á enskum. Í juli fara vit á TeenStreet at hava framløgur í trúarverju og um STEVN; síðani til Pakistan á missiónsferð í tríggjar mánaðir. Biðið fyri Joy í Pakistan og familjuni, nú mamma Shamilu andaðist í apríl.



**FØROYAR**

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

*15. juni fylla Micah og Reuben Magura 10 ár
*15. august fyllir Victoria Tuohy 17 ár

## *16. dagur* *3. Mós. 9.1-24, Lukas 8.1-18, 3. Mós. 11.24-47*

**FØROYAR**

**Birgit og Svenning av Lofti**

Svenning hevur síðan jan. havt trupulleikar við røddini, men hevur tað nógv betri nú og hevur fingið regluligar venjingar at nýta røddina rætt. Takk fyri forbøn. Vit verða í Danmark seinast í juni til hálvan juli og taka lut har í vitjanar- og lívganartænastu.



**Atlantic Mission, Juvel II**
Vitjanin í Hetlandi við Juvel II eydnaðist sera væl. Vit vóru 14 í tali, sum vitjaðu samkomur og hildu møti í almennum hølum. Gingið varð í húsini við kristiligum smáritum og innbjóðingum bæði úti á oyggjunum og í Lerwick. Trúgvandi hjálptu til og vórðu lívgað. Serstakliga mong komu til møtini hesa ferð. Samkoman Ebenezer í Lerwick stóð fyri vitjanini.



**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
Vit eru takksom fyri allar legurnar í Zarepta og virðismeta forbøn. Bíbliuskeiðið í ár verður 28. aug. - 3. sept. Tekning hjá Giddu Vang frá 18. juli á tel. 265390.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 14, Terji 11, Petra 9**

*16. juni fyllir Lukas av Rana 3 ár og Emma Guttesen 7 ár

***17. dagur Áp. 12.12-25, Ez. 1.22-2.10, Sálm 95 og 96***

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Eitt toymi úr Amerika kemur at hjálpa í eina viku við barna- og ungdómstiltakinum í juli. Vit fara til Skotlands í brúdleyp í juli. Guðrun vónar at byrja í nýggjum arbeiði í summar.

## *18. dagur* *3. Mós. 10.1-20, Lukas 8.19-39, 2. Kor. 2.1-17*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen – Trisha 11, Emma 7**
Í juni halda vit barnamøtir í bygd, har vit ikki fyrr hava skipað fyri tiltøkum. Í juli fara eg og Heidi til Filipsoyggjar saman við Megan at vitja barnaheimið, har hon vaks upp. 7-14. aug. halda vit aftur Parola, summarbíbliuskúla fyri ungar føroyingar.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 10, Micah 10**

## *19. dagur* *Áp. 13.1-25, Ez. 3.1-27, 3. Mós. 12.1-8*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**



Í summar ætla vit at hjálpa til í jarðskjálvtaøkinum. Okkum tørvar styrki, vísdóm og meiri hjálp. Vit eru takksom fyri føroyska toymi, sum vitjaðu okkum í apríl, og vóna, at fleiri koma. Havið bíbliubrævaskeiðið og heimasíðuna við í bøn, so at fleiri fáa Nýggja Testamenti og annan lesnað. Biðið, at politiska støðan batnar, serliga nú eftir valið.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. dagur* *3. Mós. 11.1-23, Sálm. 90, 2. Kor. 3.1-18*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen – Zephaniah 2, Selah Rose 0**
Vit eru takksom, at okkara viðføri varð sent til Papua ókeypis.

Biðið, at vit skjótt finna leiguíbúð og fólk at læra okkum málið og mentanina betur. Papua hevur aðra dialekt á indonesiskum enn á Java, har vit hava verið seinasta árið.

## *21. dagur Áp. 13.26-52, Lukas 8.40-56, 3. Mós. 13.1-23*

### FRANKARÍKI, Nantes, OM
### Cecile og Jóhannis Mortensen – Sarah 12, Leah 9, Abigail 4



Mong hava latið seg doypa í samkomuni í ár. Cécile hevur havt dópsfyrireiking við ungum kvinnum, nógvar úr ungdómsbólkinum. Jóhannis hevði steðg frá samkomuarbeiðnum frá febr. til miðjan mai. Nú eru vit í bøn og søkja Guds vilja fyri okkum eftir summarfrítíðina, tí Jóhannis fyrireikar seg at gerast fulltíðar trúboðari. Vit vitja familju í Danmark í summar.

### Elam Ministries, Evropa
### Margretha Højgaard Poulsen

Evropatoymið hevur havt skeið í at brúka Safar (safar.org), bæði online og til vikuskiftislegur. Safar-tilfarið er lagt til rættis til ein-til-ein upplæring av nýggjum trúgvandi og riggar væl. Tað verður so við og við týtt til onnur mál enn farsi.

## *22. dagur Sálm. 86 og 87, Ez. 4.1-17, 2. Kor. 4.1-18*

### TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360
### Wina og Benjamin Hansen – Noah Elias 11

Fyrstu vikuna í juni eru vit vertir fyri kunningartiltaki fyri okkara nýggju stutttíðartrúboðarum, sum fara til ymisk lond komandi mánaðirnar. Biðið, at vikan verður til hjálp, og um vísdóm at ala upp Noah at elska Harran.

## *23. dagur* *Róm. 16.1-16, Lukas 9.1-22, 3. Mós. 13.24-44*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen – Louis 6, Timon 4**



Hetta summarið fullføra vit mállæruskráseting. Vit ætla eisini at taka lut í málverkstovu í tvær vikur saman við samverkafamiljuni Stanley. Biðið, at verkstovan hjálpir okkum at fáa tak á vanliga talumynstrinum í kovolmálinum.

*23. august fyllir Ethan Flanagan 6 ár

## *24. dagur* *Es. 32.1-20, Ez. 5.1-17, Sálm 97 og 98*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 13, Nana 11, Louie 9, Rio 4**



Vit halda á at hava sunnudagsskúla og frálæru í enskum fyri børn. Vit fara aftur í ár at hava eitt summartiltak við børnunum, og vónandi fáa vit foreldrini við.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 15, Noah 14, Karis 10, Judah 8, Ethan 6**

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen – Elliot 7, Jude 4, Evelyn 3, Olivia 0**

*24. august fyllir Louis Hansen 6 ár

## *25. dagur* *Róm. 16.17-27, Lukas 9.23-42, 2. Kor. 5.1-21*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Umsetingarráðgevin, sum skuldi koma í mai, fekk forfall, men kemur í nov. Tí fekk eg tíð at rættlesa kladduna til 1. Sámuelsbók hjá unga umsetaranum, áðrenn eg komi heim ein túr í summar. Bíbliutímarnir halda á eina ferð um vikuna. Heilsan hjá mær hevur ikki verið so góð, men eg eri takksom fyri hjálp frá kommunulæknanum heima í Føroyum við telduposti, so eg ikki skal koma heim í úrtíð.

## *26. dagur* *Es. 33.1-24, Ez. 6.1-14, 3. Mós. 13.45-59*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen – Ryan 14**

11-16. juni hjálpa vit til at hava legu fyri børnunum hjá okkara trúboðarum her í Vesturafrika. Har verða 18 børn 11-16 ár. Evnið á leguni er Náði Guds. Biðið, at børnini verða drigin nærri Harranum. Í summar fara fleiri trúboðarar í farloyvi, og aðrir koma úr farloyvi. Vit eru eitt sindur undirmannað í summar. 16. aug. byrjar Ryan á High School.

## *27. dagur* *Ef. 5.17-33, Sálm. 91, 2. Kor. 6.1-7.1*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Takk fyri allar bønir fyri okkum og arbeiðnum í Calvary. Samkoman er støðugt vaksin síðani kovid. Vit søkja tí eftir pastorum at hjálpa í tænastuni. Vit byggja eisini uppí.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

| *28. dagur* | *Es. 34.1-17, Lukas 9.43-62, 3. Mós. 14.1-32* |
|---|---|



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Eg royni mítt besta at fáa lærutilfarið til Rómbrævið liðugt til heystar. Tað er torførari, enn eg roknaði við. Biðið, at tilfarið verður greitt fyri Kankanaey-fólkinum og til signing fyri samkomurnar. Heilsan hjá Liz er heldur frægari; vit biðja, at hon framvegis styrknar, og at vit óhindrað kunnu halda á.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp – Hanna 15**

| *29. dagur* | *Sálm. 88, 1. Mós. 30.25-43, 2. Kor. 7.2-16* |
|---|---|



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 11, Noah Kristian 9**
Vit missa nøkur av okkara lyklastarvsfólkum í The Well International. Tey, sum eftir eru, stúra fyri, hvussu tey skulu lyfta arbeiðsbyrðina. Biðið, at starvsfólk leggjast aftrat.

*29. juli fyllir Timon Hansen 4 ár

| *30. dagur* | *Ef. 6.1-24, Gal. 1.1-24, 3. Mós. 14.33-57* |
|---|---|

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
Logos Hope er í Abu Dhabi og vitjar havnir í Arabiahálvoynni í

summar. Doulos Hope er í Malaisia og vitjar havnir har í summar. Biðið um manning til tænastuna, og at gleðiboðskapurin røkkur til tey vitjandi umborð. Esther Dam Hansen og Pætur Midjord eru við Logos Hope og Ellintur Abrahamsen er skipari á Doulos Hope. Pætur kemur heim í juli. Nógv ung og vaksin fara á TeenStreet 29. juli - 5. aug. Fleiri fara á outreach í Moldova 15-29. juli.





| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. dagur* *1. Mós. 31.1-16, Sálm. 99 og 100*

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**NÝGGJ BÓK!**

**388 síður 250 kr.**

Mong kring knøttin hava notið gott av talunum hjá Óla, bæði á føroyskum og á enskum, í stórari samkomu ella í eini smáttu í frumskóginum. Boðskapurin er altíð greiður, einfaldur og lættur at minnast.

Vón mín er, at tú, sum lesur bókina, kennir hjartað brenna, sum Skriftin verður latin upp gjøgnum talurnar hjá Óla á Grømma.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo